## Eldásetingin verður kannað

Kriminalløgreglan kannar framvegis málið um tær báðar royndirnar at seta eld á Gjáar kirkju um vikuskiftið. Í gjár vóru fólk av deildini við kirkjuna og gjørdu tekniskar kanningar, eins og tey ynsktu at tosa við fólk sum vóru í bygdini um vikuskiftið. Hetta er kortini ikki bert sum at siga tað, tí nógv fólk var í Gjógv um vikuskiftið, har bæði ein familjuveitsla og eitt brúdleyp vóru á skránni. Løgreglan heitir á fólk um at venda sær til løgregluna, um tey vita okkurt sum kann hjálpa teimum at greiða málið. Tey eru serliga áhugað í, um fólk hava sæð okkurt, sum kann hava týdning fyri kanningararbeiðið, á kirkjuvegnum millum kl. 8 leygarkvøldið og sunnumorgunin kl. 9. Enn er kriminalløgreglan ikki komin á mál, og málið verður tí framvegis kannað. Gjáar kirkja stendur vanliga opin, men fyribils hevur kirkjuráðið avgjørt at læsa hana.



# Romantikkur á Vaglinum

**Í føroyskum troyggjum og oysandi regni møtti trúlovaða parið úr Eysturríki upp í býráðssalinum í Havn, har tey vórðu vígd seinnapartin fríggjadagin**

KÆRLEIKI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Eysturríska parið Eva Hiller og Thomas Wimmer gávu hvørjum øðrum lovorð í býráðssalinum í Havn fríggjadagin. Heðin Mortensen, borgarstjóri, stóð fyri sjálvari vígsluni. Vitni vóru vinmaðurin Christian og dóttir brúðrina Sonja, sum vóru komin allan vegin til Føroyar at hátíðarhalda stóra dagin saman við brúðarparinum*

Hóast tey bara kendu Føroyar frá einum nógv umrøddum fótbóltsdysti fyri mongum árum síðani, valdi eysturríkska parið Eva Hiller og Thomas Wimmer at ferðast líka til Føroyar at giftast í býráðssalinum í Havn.

Tey bæði hava altíð ferðast nógv í norðurlondum, og dáma sera væl norðurlendska mentan og ikki minst friðin, ið her valdar. Tí vóru tey ikki í iva, tá ið tey gjørdu av at fáa pappír upp á hvønn annan - leiðin skuldi ganga norðureftir.

- Vit hava vitjað øll hini norðurlondini, og tað er so vanligt at fara til Íslands. Tí fann eg uppá, at vit skuldu fara til evarska lítla landið mitt úti í Atlantshavi, sigur 44 ára gamla Eva Hiller. Hon starvast dagliga á einari røntgendeild í lítla býnum Melk uttan fyri høvuðsstaðin Wien, meðan maðurin, 40 ára gamli Thomas, býr í Wien, har hann starvast sum lærari á tekniskum skúla.

- Og vit ætla at halda fram við at búgva hvør sær tá vit eru gift, og so vitja hvønn annan, tá tørvur er á tí, greiða tey frá við einum stórum brosi.

### Ferðast kring landið

Trý fólk eru komin við teimum til Føroyar, millum annað dóttur Evu, 21 ára gamla Sonja, sum eisini var annað av tveimum vitnum, sum krevjast í slíkum førum. Hini bæði eru vinmenninir, Christian og Thomas, sum øll fóru av landinum aftur í vikuskiftinum.

Næstu tvær vikurnar fara tey bæði nýgiftu at ferðast kring oyggjarnar, eitt nú til Gjáar, Mykinesar, Hattarvíkar og Húsavíkar.

### Troyggjur í gávu

Spurd, hví tey hava valt at verða vígd í føroyskum troyggjum, greiða tey frá, at tey vanliga altíð keypa sær eina troyggju í landinum, har tey ferðast.

- Tí var tað eisini natúrligt at støkka inn á gólvi hjá Tøting á Áarvegnum, har vit valdu okkum hvør sína troyggju. Og tá handilskonan Lydia hoyrdi, at vit ætlaðu at giftast í troyggjunum, gjørdi hon ikki matari enn at geva okkum troyggjurnar í gávu. So hóast veðrið ikki vísir okkum vælvild, so er ikki eiti á blíðskapi, vit møta her á landi, siga tey bæði at enda.

# Kommunuskúlin seks skúlastovur aftrat

**Samstundis sum farið verður undir at gera víðfevnda heildarætlan fyri Tórshavnar kommunuskúla, fær skúlin seks fyribils skúlastovur at ráða yvir, meðan hann verður umvældur, umbygdur og nútímansgjørdur yvir næstu tvey til trý árini**

SKÚLI
*Tíðindaskriv*

Tórshavnar kommuna fer nú undir fyrireikingarnar til stórt umvælingar- og umbyggingararbeiði í Tórshavnar kommunuskúla, so hann í framtíðini kann liva upp til tey krøv, ið verða sett nútíðar skúlum. Skjøtul verður settur á arbeiðið um miðjan august.

Fyrsta stigið er, at ein arkitektur skal gera forkanningar og síðani eitt yvirskipað skitsuuppskot um, hvussu framtíðar kommunuskúlin í Havn skal síggja út og brúkast sigur borgarstjórin Heðin Mortensen. Í hesum arbeiði fer arkitekturin at vera í samráð við allar viðkomandi partar, so røkkast kann fram til tað besta úrslitið.

Miðað verður eftir, at yvirskipaða skitsuuppskotið um ársskiftið skal til politiska viðgerð. Síðan verður bygginevnd sett, og prosjektið koyrt víðari eftir mannagongdini fyri bygging hjá Tórshavnar kommunu.

Longu í 2002 fór umsitingin hjá Tórshavnar kommunu undir at fyrireika eina heildarætlan, og í 2004 varð ein slík ætlan politiskt samtykt í mentamálanevndini. Síðani kom av ymsum ávum steðgur í arbeiðið, men nú verður tað tikið upp aftur og gjøgnumført úr enda í annan.

### Seks stovur aftrat

Meðan arbeiðið við heildarætlanini fer fram, verða seks fyribils skúlastovur settar upp við skúlan, og verður helst brúk fyri teimum í tvey til trý ár. Tvær teirra skulu ætlandi standa í garðinum hjá Frøken Cohr, og hinar fýra verða settar upp aftan fyri Sjónleikarhúsið, sigur borgarstjórin. Umsókn um byggiloyvi verður viðgjørt í Byggi- og býarskipanarnevndini mánadagin.

Tá Tórshavnar kommuna fyri summarfrítíðina bað um skúlastovurnar, fekk kommunan at vita, at tær kundu standa klárar, tá skúlin byrjaði aftur. Men greitt er nú, at henda tíðarætlan ikki fer at halda, umframt at ikki ber til at seta stovurnar upp í ovara enda á Grasagarði, sum upprunliga ætlað.

Tí byrjar skúlagongdin í Tórshavnar kommunuskúla við somu hølisloysn sum áðrenn summarfrítíðina. Partvíst verða serhøli í skúlanum brúkt til vanliga floksundirvísing, samstundis sum avtalan um Bridgehúsið verður longd. Men í viku 38 og 39 sleppur skúlin at brúka tær seks nýggju skúlastovurnar, sigur borgarstjórin.